# BILAR

SAMBAND
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

2CV konseptbilur:

# Studenta-jaguarur kemur aftur








2CV varð fyrstu ferð sýndur fram sum prototypa í 1939 og var á marknaðinum til 1990

*Citröen verksmiðjan hevur nú ætlanir um at koma á marknaðin aftur við góða gamla 2CV í 2009*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað er so at siga vorðin siðvenja at væl umtóktir bilar, sum fyrr hava verið á marknaðinum, koma aftur í nútímans útgávum sum t.d. VW New Beetle, Mini og Ford Mustang.

Citröen hava nú ætlanir um at koma á marknaðin aftur við góða gamla 2CV í eini nútímans útgávu við nýggjum designi í 2009.

Citröen 2CV varð fyrstu ferð sýndur fram sum prototypa í 1939. Bilurin var á marknaðinum heilt til 1990. 2CV hevði mong kelinøvn sum t.d. Studenta-jaguarurin.

Bretska bilmagasinið Autoexpress skrivar, at bilurin kemur at fáast bæði við stoff- og glastaki.

# Nýtt snið til Saab 9-3

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Seinni í ár fær Saab 9-3 eina sonevnda facelift, tá bilurin verður dagførdur við meira markantum designi og betri koyrieginleikum.

Framman verður eyðkennið fyri nýggja modellið størri kølaragittar og rammur rundan um tokulyktirnar. Aftan eru eisini nakrar designbroytingar, eins og designið sum heild er broytt.

Saab 9-3 fekk annars gullmedalju frá ”Insurance Institute for Highway Safety” í USA í fjør, sum er hægsta viðurkenning fyri trygd.

Saab 9-3 í nýggju útgávuni kemur eftir ætlan á marknaðin í september.



*Eyðkennið fyri nýggja Saab 9-3 verður størri kølaragittar og rammur rundan um tokulyktirnar*

**Ellisakfar til sølu**



**Volvo 144 sedan, árg. 1971.**
Bilurin varð høvuðsumvældur í 1994 og er í góðum standi. Bert tveir eigarar, einans koyrt 85.000 km.
**Tel. 282805**